# Býráðið

**Dagfesting:** 01.05.2025 kl. 19:00
**Málnr.:** 25/00008

Nevndarlimir: Dávur Juul, Ólavur Larsen, Eyðun á Lakjuni, Eivin Breiðaskarð, Sonni á Horni, Jóan Pauli Olsen, Jastrid á Dalbø, Ørvar Jacobsen, Kristian Martin Petersen

Varalimir:

Ikki møtt:

Onnur:

Nevndarskrivari: Jóanis Erik Køtlum

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 17/25 | 25/00195-1 | Umbøn um eykajáttan til nýggja køkin á Vesturstovu |
| 18/25 | 25/00192-2 | Oyran Frítíðarøki – Strandarflogbóltsvøllur |
| 19/25 | 25/00238-1 | Vælkomstpakki - uppskot um avtøku av tilboðnum |
| 20/25 | 24/00447-16 | Útboð - umvæling av bygningi og nýggjar ljósmastrar til umhvørvisplássi á Kambsdali |
| 21/25 | 25/00232-3 | Tørvur á nýggjari lungamaskinu til Heilsumiðstøðina |
| **Til kunning** | | |
| | | |

1

**Til støðutakan**

**17/25**
**25/00195-1 Umbøn um eykajáttan til nýggja køkin á Vesturstovu**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.03.2025 | 24/25 |
| 2 Býráðið | 27.03.2025 | 14/25 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 34/25 |
| 4 Býráðið | 01.05.2025 | 17/25 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Fíggjarnevndin |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Í 2024 var íløgujáttanin til køkin á Vesturstovu kr. 5 mill. Tá ið arbeitt bleiv við fíggjarjáttanini fyri 2025 var greitt, at køkurin ikki bleiv liðugur fyrr enn fyrsta kvartal 2025, og at tað ikki bleiv møguligt at brúka alla íløgujáttanina í 2024. Tí skuldi tann játtanin sum ikki bleiv brúkt í 2024 framflytast til íløgujáttanina fyri 2025.<br><br>Onkur misskiljing er tó hend, tí tað hevur víst seg, at tað bert eru framfluttar kr. 500.000, og við árslok, vóru kr. 2.593.981 eftir av játtanini. Tvs. at 2.093.981 kr. mangla at blíva framfluttar til íløgujáttanina fyri 2025<br><br>Av tí at framflytingin ikki er hend í sambandi við fíggjarjáttanararbeiðið 2025, má málið fyri fíggjarnevndina og býráðið sum ein umbøn um eykajáttan uppá 2.093.981 kr. svarandi til tað sum er eftir av íløgujáttanini frátrekt 500.000 sum bleiv framflutt til fíggjarjáttan 2025.<br><br>Afturat hesum er eitt ynski um at seta eina dupulta løgistøð til elbilar upp á Vesturstovu. Hettar hevur ikki verið partur av verkætlanini, og er tí ikki við í upprunaligu játtanini. Tó hava vit í verkætlanini verið so framsíggin, at nýggja eltalvan er gjørd klár til at ein løðistøð kann setast upp. Ein einkult løðistøð frá SEV kostar uml. 35.000 kr. Vit meta, at tað er tørvur á einari dupultari løgistøð. Metti kostnaðurin fyri eina dupulta løgistøð og kaðararbeiðið er 100.000 kr. við mvg. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td rowspan="1"></td><td colspan="3">Nánd arbeiðir við at samla allar trýggjar køkarnar sum Nánd í løtuni rekur á Vesturstovu. Nýggjur køksleiðari er settur, og nakrir fundir hava verið við hana nú tað nærkast, at køkurin verður liðugur. Tað hevur víst seg, at kóki og steikikapasiteturin verður ov lítil, og at vit tí mugu keypa ein ovn afturat, eina steikiplátu og eina størri grítu enn tann sum upprunaliga er bíløgd. Neyðugt er at trekkja ein nýggjan elkápil til eyka ovn og steikipannu. Samanlagt verður talan um eina metta meirútreiðslu uppá kr. 250.000 við mvg.<br><br>Hvat verður biðið um: — Upphædd:<br>Framflyting av játtan frá 2024 — 2.093.981<br>Uppstigan av køksútgerð — 250.000<br>Løðistøð til elbilar — 100.000<br>Í alt: — 2.443.981</td></tr>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Umbøn um eykajáttan og framflyting av íløgujáttan frá 2024</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4" align="center">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td></td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til, at fíggjarnevndin tekur støðu til umbøn um eykajáttan</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">14-03-2025</td></tr>
</table>

| Hvat verður biðið um: | Upphædd: |
|---|---:|
| Framflyting av játtan frá 2024 | 2.093.981 |
| Uppstigan av køksútgerð | 250.000 |
| Løðistøð til elbilar | 100.000 |
| **Í alt:** | **2.443.981** |



**Fíggjarnevndin 20. marts 2025:**
Fíggjarnevndin tekur einmælt undir við eykajáttanini og mælir býráðnum til, at góðkenna hesa við 1. viðgerð 27. mars. 2025.

**Býráðið 27. marts 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við eykajáttanini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

**Fíggjarnevndin 24. april 2025:**
Fíggjarnevndi mælir býráðnum til at taka undir við eykajáttanini til 2. viðgerð. og at upphæddin verður tikin av tøkum peningi.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini 24. apríl 2025

4

## 18/25
## 25/00192-2 Oyran Frítíðarøki - Strandarflogbóltsvøllur

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentamálanevndin | 01.04.2025 | 18/25 |
| 2 Býráðið | 01.05.2025 | 18/25 |

### Tilráðing

| Til viðgerðar í | Mentamálanevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Nú miðbýarætlanin er samtykt , nevndin fyri miðbýarætlanina so smátt er farin til verka og nakað av peningi er sett av til íløgur, so kunnu vit konstatera, at talan verður um langtíðararbeiði, sum verður tætt tengt at komandi íløgukarmum.<br>Men við eini miðbýarætlan og við samstarvi við arkitektarnar Eya, er eisini møguligt at arbeiða samsvarandi miðbýarætlanini, við at bjóða samstørvspørtum, sum møguliga kunnu hjálpa okkum at gera íløguna og soleiðis flyta okkum skjótari fram.<br><br>Á fundi 29. oktober 2024, var avgerð tikin um at fáa EYA at gera eitt kjakupplegg yvir Oyruna, sum fylgir prinsippunum í miðbýarætlanini. Við á fundinum var stjórin á Havsbrún, umboðandi partar av vinnulívinum, sum saman við fólki úr fyrisitingini og býráðnum, viðgjørdi møguleikarnar fyri samstarvi um Oyruna. Á fundinum kom fram, at vinnan er áhuga at gera íløgu í Oyruna, saman við kommununi.<br><br>Nú fyriliggur kjakuppskot frá Eya arkitektum og kunnu vit tískil seta málið á skrá aftur.<br><br>Samstundis hevur FFK verið í samband við Flogbóltsamband Føroya, sum hevur sent skriv inn til kommununa, við fyrispurningi um Fuglafjørður er áhugaður at byggja ein Sandflogbóltsvøll og taka av møguleikanum at verða vertir fyri Sandflogbólt á Oyggjaleikum 2027. FFK hevur fingið váttan frá FBF og Oyggjaleikanevndini um at Sandflogbóltur verður í Fuglafirði. Somuleiðis hevur FBF verið í samband við bæði Berfrost og eisini Havsbrún um evt. møguleikar til innandura sandflogbóltshølir.<br><br>Um tað skal arbeiðast víðari við Oyruni, saman við vinnuni og á tann hátt byrja uppá Oyruna sum part av miðbýarætlanini, má málið leggjast fyri býráðið.<br>At fingið Oyggjaleikir til Fuglafjarðar, vildi givið býnum nógva umtalu og vildi promovera Fuglafjørð væl, umframt at fingið nógvar gestir á vitjan í býnum. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Í 2016 kom eitt uppskot frá Havsbrún um at gera Oyruna til eitt frítíðarøki, við venjingaramboðum, grønum økjum, møguleika fyri uttandura ítrótti o.s.v. Uppskoti legði upp til samstarv millum kommunu og vinnu, eisini viðvíkjandi íløgu.<br>Uppskotið legði upp til at Oyran verður fyri allar borgarar at hittast og vera saman um ymisk frítíðar ítriv. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Upplegg til fund 29.10.2025. millum FFK og Havsbrún.<br>• Kjakuppskot frá EyaArkitektum<br>• Tilfar frá FBF<br>• Uppskot frá 2016 um strandflogbóltsvøll<br>• Váttan at Strandaflogbóltur verður spældur í Fuglafirði. | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | Mælt verður til at mentamálanevndin kunnar/leggur fyri býráðið at arbeitt verður við málinum.<br>Bæði at arbeitt verður við at fáa Oyggjaleikir til Fuglafjarðar, við Sandflogbólti og møguliga vanligum flogbólti. Men eisini at arbeitt verður við einum heildarætlan, sum inniber at vinnan samstarvar við Fuglafjarðar kommunu at gera Oyruna í samsvar við miðbýarætlanina, sum sostatt kemur at fíggja part av uppræðfestingini av Oyruni. | | |
| Dagf | 21.03.2025 | | |

6

**Mentamálanevndin 01. april 2025:**

Nevndin tekur undir við tilmælinum og leggur málið fyri býráðið at fáa váttan fyri at arbeiðast kann víðari við at fyrireika málið. Ávegis í býráðið, fer málið til umrøðu í miðbýarnevndina.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Jastrid á Dalbø kom við uppskoti um, at arbeitt verður við aðrari staðseting av strandaflogbóltinum t.d. omanfyri fótbóltsvøllin.

Fyrsta varð atkvøtt um broytingaruppskotið frá Jastrid á Dalbø.
Òlavur Larsen, Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen og Jastrid Á Dalbø atkvøddu fyri meðan Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu ímóti. Uppskotið fall sostatt.

Síðani varð atkvøtt um tilmæli frá Mentamálanevndnini.
Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, Kristian Martin Petersen, Jóan Pauli Olsen og Eivin Breiðaskarð atkvøddu fyri. Ólavur Larsen, Sonni á Horni, Ørvar Jacobsen og Jastrid Á Dalbø Atkvøddu ímóti. Uppskotið varð sostatt samtykt.

7

# 19/25
# 25/00238-1 Vælkomstpakki - uppskot um avtøku av tilboðnum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.04.2025 | 11/25 |
| 2 Býráðið | 01.05.2025 | 19/25 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd og býráðið |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **7. apríl 2025 – sosiala nevnd**<br>1. oktober 2015 bleiv avgerð tikin um at lata eina vælkomstgávu til nýggjar borgarar, sum flyta til Fuglafjarðar kommunu. Innihaldið í vælkomstpakkanum var: ein taska, pennur, filmur, blokkur, ein pjesa (kommunan í tølum) og ein heilsan frá borgarstjóranum. Umframt vælkomstgávuna, læt Fuglafjarðar kommuna tríggjar teir fyrstu mánaðirnar ókeypis barnaansing, til hvørt barn sum ansað var á dagstovnunum hjá kommununi.<br><br>Avgerðin um vælkomstpakkan var úrslitið av einari verkætlan sum kommunan gjørdi saman við Sendistovuni. Spurdómurin í verkætlanini var «Hvussu branda vit Fuglafjørð». «Fuglafjørður – har familjurnar trívast»<br><br>Tað er óvist, nær vit eru givin við at veita tann fysiska gávupakkan, men avgerð er ongantíð tikin um at avtakað skipanina, som enn í dag, fáa tilflytarar við børnum á dagstovni fríðan dagstovn frá Fuglafjarðar kommunu í tríggjar mðr.<br><br>Tað er ymiskt frá ár til ár, hvussu nógv hendan skipanin kostar kommununi, tí tað avhongur av, hvussu nógv flyta til kommununa sum hava børn í aldrinum 0 – 8 ár sum ganga á dagstovni ella frítíðarskúla. Seinastu fimm roknskaparárini hevur miðal útreiðslan til gávupakkan verið góðar 140.000 kr. um árið.<br><br>**Ár** / **Kostnaður**<br>Januar – desember 2020: 115.775,00<br>Januar – desember 2021: 168.550,00<br>Januar – desember 2022: 141.200,00<br>Januar – desember 2023: 134.850,00<br>Januar – desember 2024: 140.400,00<br>Januar – 1. apríl 2025: 41.925,00<br><br>Skipanin bleiv sett í verk uttan nakra útgreinaða vegleiðing annað enn, at tilflytarar sum hava børn á dagstovni skulu hava ókeypis dagstovn í tríggjar mðr. Hettar gevur nøkur ivamál. Skulu borgarar, sum koma frá bygdini, men sum hava búð í aðrari kommunu í 1 ár og so flyta aftur, hava frádráttin? Um tú hevur haft barn á stovni, men tekur barnið úr tilboðnum og flytur kommunu, og eftir stutta tíð angrar hettar og flytur aftur, skalt tú so hava ókeypis stovnspláss í tríggjar mánaðir? |

| | |
|---|---|
| | Her eru nøkur av teimum temaunum sum eisini hava verið uppi og vent og spurningar sum eru settir í mun til skipanina.<br>• Hvussu skilgreina vit, hvør er tilflytari – sí frágreiðing omanfyri<br>• Hví skulu skattaborgarar sum hava goldið skatt alla tíðina gjalda fyri, at tilflytarar, som ongan skatt hava goldið, skulu hava ókeypis stovnspláss, meðan skattaborgarin sum hevur goldið skatt alla tíðina, skal gjalda fyri stovnsplássi?<br><br>Tað er ongin kunning á heimasíðuni hjá kommununi um. At tilflytarar fáa fríðan dagstovn fyrstu 3. mánaðirnar, tí er ikki sannlíkt, at tey, sum eru flutt hertil, hava valt Fuglafjørð grunda á gávupakkan.<br><br>Borgarstjórin hevur skotið upp, at vælkomstpakkin verður strikaður. Út yvir tey argumentini sum eru lýst Hann leggur eisini dent á, at tað er ein eyka administrativ uppgáva at umsita skipanina.<br><br>**1. mai 2025, Býráðið**<br>Sosiala nevnd hevur á fundi tann 7. apríl viðgjørt málið, og semja var um at senda málið víðari til býráðið við uppskotið um at strika skipanina um fríðan dagstovn í tríggjar mánaðir til børn hjá tilflytarum. |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Borgarstjórin ynskir at Sosiala nevnd tekur máli til viðgerðar og tekur støðu til, um tilboð um vælkomstpakka til tilflitarar skal avtakast. |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl |

| Viðgerð | | | |
|---|---|---|---|
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | | X |
| | Umsitingarligar | | X |
| Tilmæli | **7. apríl 2025 – Sosiala nevnd**<br>Mælt verður til, at sosiala nevnd tekur støðu til, um uppskotið um at strika vælkomstpakkan um fríðan dagstovn í tríggjar mánaðir til børn hjá tilflytarum.<br><br>**1. maj 2025 – Býráðið**<br>Mælt verður til at býráðið tekur støðu til uppskotið frá sosialu nevnd um at strika skipanina, har tilflytarar frá fríðan dagstovn í trýggjar mánaðir til børn sum ganga á dagstovni. | | |
| Dagf | 2. apríl 2025 og 11. apríl 2025 | | |



<u>**Sosiala nevnd 07. april 2025:**</u>
Semja var um at senda málið víðari til býuráðið við uppskotið um at avtakað skipanina.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Málið varð beint aftur í Sosialu nevnd.



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**20/25**
**24/00447-16 Útboð - umvæling av bygningi og nýggjar ljósmastrar til umhvørvisplássi á Kambsdali**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Orku og umhvørvisnevndin | 07.04.2025 | 10/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 29/25 |
| 3 Býráðið | 01.05.2025 | 20/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Orku- og umhvørvisnevnd, fíggjarnevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | Umsitingin hevur heitt á Skarsá smíð og Karlsson fa um at geva prís á umvælingar av bygninginum á nýggja móttøkuplássinum á Kambsdali. Báðar fyritøkurnar hava latið inn tilboð hin. 03. apríl 2025. Nakað av peninginum sum er fluttur um ár var til at klæða húsið og at gera arbeiði sum ikki bleiv gjørt í 2024 liðugt. Tað sum ikki var við í projektinum eru ljósmastrar til økið. Her hevur SMJ gjørt eitt projekt sum umsitingin hevur boðið út til tveir arbeiðstakarar; Elverk og GroAqua. Tilboðið frá Elverk er við uppsetan, tilboðið frá GroAqua er uttan uppsetan.<br><br>Lægsta tilboðið til umvælingina av bygninginum er 1.305.210 kr + mvg. Einki óvænta er í projektinum, og mælir umsitingin til at í minsta lagi 10% verður til óvæntað, so upphæddin eitur 1.435.731kr.<br>Lægsta tilboðið við ljósmastrum og uppsetan er á 88.422kr + mvg. Eisini her verður mælt til at 10% verður sett av til óvæntað so upphæddin verður 97.264,20kr + mvg<br><br>Samanlagt fara hesi bæði projektini at kosta 1.435.731 + 97.264,20= 1.532.995,20kr + mvg.<br><br>Upphæddin sum er á játtanini við upphæddini frá 2024 er 1.200.000kr. v mvg, harav eru 17.500kr v/mvg brúktar til projektering av ljósinum. Av hesi játtanini eru (600.000kr + 298.000kr frá 2024) 898.000kr v/mvg til húsið.<br><br>Játtan: **841.875,00 kr + mvg**<br>Útboð v/ 10% óvæntað: 1.435.731,00 kr + mvg<br>Ljósmastrar v/ 10% óvæntað: 97.264,20 kr + mvg<br>Eykajáttan: 691.120,20 kr + mvg |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

<table>
<tr><td>Orsøk til at málið verður viðgjørt</td><td colspan="3">Málið verður viðgjørt av tí at upphæddin er hægri enn játtanin fyri 2025.</td></tr>
<tr><td>Grundarlag</td><td colspan="3">• Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl</td></tr>
<tr><td colspan="4">Viðgerð</td></tr>
<tr><td rowspan="3">Tekstur íð lýsir loysn</td><td>Avleiðingar</td><td>Stuttíðar</td><td>Langtíðar</td></tr>
<tr><td>Fíggjarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Umsitingarligar</td><td>x</td><td></td></tr>
<tr><td>Tilmæli</td><td colspan="3">Mælt verður til at umsitingin fer í samrá við Skarðsá smíð um at umvæla bygningin<br>Mælt verður til at taka av lægsta tilboðnum uppá ljósmastrarnar sum er frá Elverk<br>Fyri at játtanin skal halda, verður mælt til at ein eykajáttan á 700.000 kr + mvg verður játta til RS711.</td></tr>
<tr><td>Dagf</td><td colspan="3">04.04.2025</td></tr>
</table>



**Orku og umhvørvisnevndin 07. apríl 2025:**
Orku- og umhvørvisnevndin mælir fíggjarnevndini til at fylgja tilmælinum frá umsitingini

**Fíggjarnevndin 24. april 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum og mælir harafturat til at økið ikki verður tikið í nýtslu fyrr enn alt er liðugt.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við uppskotinum frá fíggjarnevndini 24. apríl 2025.

**21/25**
**25/00232-3 Tørvur á nýggjari lungamaskinu til Heilsumiðstøðina**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 07.04.2025 | 9/25 |
| 2 Fíggjarnevndin | 24.04.2025 | 33/25 |
| 3 Býráðið | 01.05.2025 | 21/25 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Sosiala nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing av málinum | **7. apríl 2025 – Sosiala nevnd**<br>Tá ið nýggja heilsumiðstøðin bleiv tikin í brúk, bleiv útgerðin frá gomlu hølunum flutt inn í nýggju hølini. Nú boðar læknin frá, at tann lungamaskinan sum tey hava er gomul, og at tey hava trupulleikar við at skaffa deilir til maskinuna.<br><br>Vit hava kannað møguleikarnar. Tað eyðnaðist at skaffa partir til verandi tól, so tey kunnu klára seg til einaferð í summar. Vit hava tó fingið tilboð uppá eina nýggja lungamaskinu, tí væntandi verður neyðugt at skifta maskinuna út.<br><br>Ein nýggj maskina kostar kr. 72.181,00 kr. við mvg hertil kemur útreiðslan til ein vogn, sum maskinan skal standa á.<br><br>Heilsumiðstøðin hevur bert 30.000 kr. til amboð í inniverandi árið. Vit hava brúkt uml. 15.000 av hesi játtan til nú í ár, tí vit hava játta at keypa tvær **CPR/HbA1c** maskinur til blóðanalysir.<br><br>Tí er tørvur á at biða um eina eykajáttan til keyp av einari EKG – Cardiovit CS104 + Spirometur, um játtanin fyri inniverandi ár skal halda.<br><br>**24. apríl 2025 - Fíggjarnevndin**<br>Sosiala nevnd hevur á fundi tann 7. apríl 2025 játta at keypa eina nýggja lungamaskinu. Sum framgongur av málslýsignini, er prísurin fyri eina tílíka maskinu so høgur, at tað er neyðugt við einari eykajáttan. Sosiala nevnd hevur játta, at maskinan kann keypast, og sendur málið víðari til fíggjarnevndina til viðgerðar.<br><br>Síðani máli hevur verið fyri í Sosialu nevnd hava vit fingið eitt tilboð uppá, hvat borðið sum hoyrir til maskinuna kostar. Prísurin fyri borðið |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | er kr. 20.900 kr. uttan MVG. So samlaða umbønin um eykajáttan er kr. 94.387,25 incl. 6,25 í mvg. | | |
| Orsøk til at málið verður viðgjørt | Lungamaskinan hjá heilsumiðstøðini er gomul, og læknin boðar frá, at tey hava trupulleikar við at skaffa deilir til maskinuna, og at tey skjótt eru í uppisetri við deilum sum tørvast fyri at brúka maskinuna. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt<br>• Møgulig fylgiskjøl | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | X | |
| | Umsitingarligar | | |
| Tilmæli | **Sosiala nevnd 7. Apríl 2025**<br>Mælt verður til, at Sosiala nevnd umrøður málið og tekur støðu til umbøn um eykajáttan til nýggja EKG – Cardiovit CS104 + Spirometur<br><br>**Fíggjarnevndin 24. apríl 2025**<br>Mælt verður til, at fíggjarnevndin umrøður málið og tekur støðu til umbøn um eykajáttan til nýggja EKG-Cardiovit CS104 + Spiroetur | | |
| Dagf | 31.03.2025 og 11. apríl 2025 | | |



**Sosiala nevnd 07. april 2025:**
Sosiala nevnd játtar at keypa eina nýggja lungamaskinu. Fíggjarnevndin verður kunnað um játtanina, tí neyðugt verður við einari eykajáttan í heyst.

**Fíggjarnevndin 24. april 2025:**
Fíggjarnevndin tekur undir við tilmælinum frá sosialu nevnd og mælir til at upphæddin verður tikin við á komandi eykajáttan.

**Býráðið 01. maj 2025:**
Býráðið tók einmælt undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og sendir málið víðari til 2. viðgerð.

15

FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

**Til kunning**



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

Fundurin lokin kl. 20:35

Dávur Juul

Ólavur Larsen

Eyðun á Lakjuni

Eivin Breiðaskarð

Sonni á Horni

Jóan Pauli Olsen

Jastrið á Dalbø

Ørvar Jacobsen

Kristian Martin Petersen